

# Chestnut: Longri livitíð gagnar Atlantic Petroleum

**Jan Müller**

11.09.2013 - 18:33

Oljan.fo

Framleiðslan í Chestnut kelduni í bretska partinum av Norðsjónum, sum Atlantic Petroleum er partur av, vísir seg nú at vera so mikið góð, at livitíðin hjá kelduni er fyribils longd eitt ár.

Hetta er orsøkin til, at fyristøðufelagið Centrica Energy hevur gjørt av at longja avtaluna við eigaran av framleiðsluskipinum,Teekay Hummingbird Production Limited, soleiðis at oljuframleiðsluskipið á Chestnut leiðini nú kann arbeiða heilt fram til mars í 2016.

Broytingin merkir, at reservurnar hjá Atlantic Petroleum í Chestnut vaksa úr 300 túsund til 350 túsund tunnur netto. Tað er sera týdningarmikið fyri føroyska oljufelagið at fáa fleiri

reservur, sum kunnu framleiðast. Longri livitíð á Chestnut økir um oljugoymslurnar hjá Atlantic Petroleum.

Ben Arabo, stjóri í Atlantic Petroleum sigur í eini viðmerking, at tey eru sera væl nøgd við, at keldan goymir meira olja enn hildið, og at tað hevur eydnast at longja avtaluna við Teekay og harvið kunna framleiða olju í longri tíð enn ætlað. Alt nakað, sum gagnar urslitinum hja føroyska oljufelagnum.

Sum skilst er ikki ómøguligt, at reservurnar oljugoymsluni eru uppaftur størri, tá avtornar, og at endaárið ikki verður 2016 men kanska enn longri úti í framtíðini